## Eivør í Sandavágs kirkju

Skrírisdag, tann 5. apríl, klokkan 17.00 fer Eivør Pálsdóttir at hava konsert í Sandavágs kirkju.

Konsertin er liður í hátíðarhaldi í samband við, at tað tann 29. apríl eru liðin 90 ár, síðan Sandavágs kirkja varð vígd.

Endalig skrá fyri konsertina er enn ikki løgd, men verður kunngjørd beinanveg, hon er tøk, verður sagt frá Sandavágs kommunu, sum saman við kirkjuni skipar fyri konsertini.



## Fýlast á skúlaætlan

Ætlanin hjá landsstýrinum at veðhalda fyri láni til at byggja tann ætlaða skúladepilin í Marknagili í Havn fellur ikki í góða jørð í fíggjarmálaráðnum og á Gjaldstovuni. Útvarpið veit at siga, at í einum ummæli í fíggjarmálaráðnum skrivar ein ráðgevi, at ætlanin ber boð um vánaligt arbeiðslag og dára hugburð. Stjórin á Gjaldstovuni er heldur ikki fegin. Hann sigur ætlanina vera tekin um, at fólk vilja ikki síggja veruleikan í eyguni.

# … so glað og fró …

**Tey smáu hava gingið til fimleik í vetur, og leygardagin sýndu tey síni nývunnu kynstur fyri vinum og kenningum.**

FRAMSÝNING
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Tey vóru bæði spent og ágrýtin, tá tey leygardagin skuldu sýna fram síni kynstur fyri foreldrum, systkjum, abbum og ommum.

Og eins væl og tey hugnaðu sær, fingu eisini áskoðarar eina hugnaliga løtu í skúlanum úti í Nólsoy.

Tað er Heidi Pedersen – av Bornholm! – ið hevur havt fimleik við teimum smáu í vetur. Undirtøkan hevur verið ógvuliga góð, og eini 15 børn hava gingið til venjingar meginpartin av vetrinum. Tey eru býtt upp í tveir bólkar, yngru og eldru.

Í yngra bólkinum eru tey 3-5 ára gomul, meðan eldri bólkurin er frá 6 til 10 ár.



*Í yngra bólkinum eru tey Heidi (venjari), Sóleyð, Silja, Fríða, Rikard, Sólja og Beinta. Alda og Tinna vanta á myndini.*



*Tey høvdu leitað sær niðan í skúlan at hyggja, smá systkin og abbar.*



*Levi Niclasen og konan vóru komin heilt úr Hvalba at síggja abba- og ommudóttrina gera fimleik.*



*Tey eldru eru Emma, Bjørt, Bjørg, Tomasia og Heidi, meðan Teitur liggur á longs frammanfyri*